tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 05.05.2022 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir: Jens Arni Leo Hammerfoss

Ikki møtt: Bjarni Hammer, fráboða

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 24/22 | 21/00062-3 | Nýggjar bátabrúgvar í bátahylinum á Tværábakka |
| 25/22 | 22/00137-1 | Tvøroyrar skúli -Leasingsáttmálið Sp.F Aktiv farteldur til lærarar |
| 26/22 | 22/00125-2 | -LUKKA |
| 27/22 | 21/00594-1 | -LUKKA |
| 28/22 | 22/00219-2 | -LUKKA |
| **Til kunningar** | | |
| 11/22 | 22/00096-1 | Skattatøl 2022 |
| 12/22 | 21/00588-9 | Planlegging og Innkeyp av útgerð til spæliplass í Fróðba |
| 13/22 | 22/00175-5 | Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 827a í Froðba - Marlena Dahl Joensen og Søren Skov Jensen |
| 14/22 | 22/00183-2 | FM radio støð -FM1/Voxpop |
| 15/22 | 22/00197-1 | Jarðhiti - kunning um umsóknir í 2022 |
| 16/22 | 22/00198-1 | Nýtt parkeringspláss á Hamri - á matr. 66b |
| 17/22 | 22/00201-2 | Ósin í Trongisvági hevur flutt seg norðureftir |

| | | |
|---|---|---|
| 18/22 | 22/00202-1 | Umsókn um gerð av parkeringspláss á matr. nr. 541a og 541b á Tvøroyri - Varðin Pelagic |
| 19/22 | 22/00204-1 | Starvsfólk til bókhaldið |
| 20/22 | 22/00213-2 | Kantinan í ítróttarhøllini -útboð av rakstrinum 2022 |
| | | |

Kristin Michelsen setur fundin, og kunnar um at 1 býráðslimir (Bjarni Hammer) hevur fráboða forfall til fundin.

Fráboðan um forfall er komið frá Bjarna Hammer, sum hevur heitt á fyrsta varalim um at møta, sum er Eyð Eidesgaard, men henni ber ikki til at møta, og tí møtur annar varalimur, ið er Jens Arni Leo Hammerfoss.

Atkvøtt verður um hvørt Jens Arni Hammerfoss Leo, sum er annar varalimur á lista C, Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. Nov. 2020 kann taka sætið í býráðnum. Hetta er einmælt samtykt.

Kristin Michelsen lesur upp skránna og spyr um viðmerkingar eru til hesa.
Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon tekur ikki undir við skránni, tí at málið val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS ikki er á skrá, samb. lutfallvalháttinum, og ynskjir hon at hetta mál verður sett á skrá.

Eisini ynskir Súsanna Bertholdsen at mál um bygging av næmingaheimi og mál at viðgerða gávu til Fiskepigernes fagforening nú felagið fylti 100 ár.

Kristin Michelsen upplýsir, at val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS er avgreitt av Tvøroyrar býráð, við 3 viðgerðum og samtyktum í januar og februar 2021, samt 3. februar 2022.

Kristin Michelsen kunnar um at málið viðv. gávu til Fiskepigernes fagforening er á skrá til komandi fund í fíggjarnevndini, og hetta verður umvegis tilmælið frá Mentanarnevndini.

Kristin Michelsen kunnar um at málið viðv. bygging av næmingaheimið, ikki er á skrá, tí ongin áheitan frá nevnd er komin til býráðið. Kristin Michlesen kunnar um at málið verður tikið upp í umsitingini.

Til støðutakan

**24/22**
**21/00062-3 Nýggjar bátabrúgvar í bátahylinum á Tvørábakka**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 10.05.2021 | 16/21 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 04.06.2021 | 23/21 |
| 3 Vinnu- og havnanevndin | 08.11.2021 | 39/21 |
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 07.02.2022 | 2/22 |
| 5 Vinnu- og havnanevndin | 07.03.2022 | 2/22 |
| 6 Vinnu- og havnanevndin | 04.04.2022 | 5/22 |
| 7 Fíggjarnevndin | 21.04.2022 | 45/22 |
| 8 Býráðið | 05.05.2022 | 24/22 |

**Málslýsing Tekniskur leiðari 06-05-2021:**
Hugt hevur verið at ymiskum loysnum og enn er niðurstøðan at ein smiðju loyn er væl dýrari enn ein liðug system loysn. Allar loysnir sum skulu nýtast fara at krevja at arbeiði skulu gerast á staðnum. Hesi arbeiði kunnu gerast av lokalum veitara.
Ymiskar loysnir eru:
Tann sum vit kenna frá bátahylinum á Tvørábakka í dag, har ein flótibrúgv er fest í land og á flótibrúgvina er fest 8 metrar armar, til bátaplássini. Henda loysn fylgir flóð og fjøru, so armar og flótibrúgv altíð liggja í somu hædd yvir havyvirflatuni.
Onnur loysn sum er nýtt, er tann sum er í Bærentshavinum, har armar eru festir beinleiðis í land og eru armarnir gjørdur við einum eyka liði millum land (2 lið á sjálva arminum) og sjálva bátabrúgvina. Hesar brúgvar eru sera "livandi" og loysn sum er nýtt virkar, men júst henda hevur tann vansa, at flóti undir miðjuni er ov lítið og tí søkur miðjan langt niður, tá ein gongur út eftir arminum.
Aðrar loysnir kundi verið at haft eina stál kai kant og so 2 lið armin, hetta er sama loysn sum í Bærentsenhavinum, har betong kanturin er skiftur út við stál.
Hvør leistur og loysn skal nýtast.

**Vinnu- og havnanevndin 10. maj 2021:**
Nevndin ynskir at arbeitt verður víðari við málinum.

**Vinnu- og havnanevndin 04. juni 2021:**
TD ger nýt útbjóðingartilfar í mun til bátabrúgvarnar.

**Vinnu- og havnanevndin 11. oktober 2021:**
Nevndin ynskir at innari kanturin verður gjørdur fastur og at tekniska deild heintar tilboð inn uppá hettar arbeiði, skjótast gjørligt. Líknandi loysn sum er í hylinum í Trongisvági.

**Málslýsing - Tekniskur leiðari 04-11-2021:**
Fundur hava verið við tveir ymiskar lokalar veitarar um ymiskar loysnir, uttan at loysnir hava verið endaligar og ítøkiligar.

**Lógargrundarlag:**
NA

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Peningur er settur av til bátabrúgvar á FÆ21.

**Tilmælið:**
At gera eitt nøktandi útbjóðingar tilfar.

**Vinnu- og havnanevndin 08. november 2021:**
Eimælt samtykt at bjóða arbeiði út til tveir ellar trýggjar lokalar veitarar uppá at gera fastan kant og bátabrúgavar. Hettar verður gjørt av tekniska leiðaranum í viku 46/ 2021. Loysnin sum nevndin ynskir er at innari kanturin verður gjørdur fastur. Líknandi loysn sum er í hylinum í Trongisvági.

**Tekniski leiðarin 03-02-2022:**
Tilfar at bjóða út er liðugt.

**Vinnu- og havnanevndin 07. februar 2022:**
Einmælt samtykt at bjóða arbeiðið út grundað á fyriliggjandi útbjóðingartilfar.

**Vinnu- og havnanevndin 07. marts 2022:**
Útbjóðingar tilfar er sent út til tryggjar veitarar. Ástaðar fundur hevur verið og tilboð uppá bátabrúgvar vera latin inn 21.03.2022.

**Tekniski leiðarin 01-04-2022**
Tríggjar fyritøkur vóru spurdar um at geva tilboð uppá at gera nýggjar bátabrúgvar í bátahylinum undir Tvørábakka. Tvær fyritøkur hava sligið seg saman um at geva tilboð og var hettar móttikið 28.03.2022. Tilboðið var áljóðandi kr. 4.603.653,-. Síðani hevur verið fundur við partarnar, har hugt hevur verið eftir sparingum. Við at gera broytingar er komið fram til eina sparing á 362.000,-. Sum støðan er nú í mun til veitingar so er av al stórum týdningi at arbeiðini vera sett í verk, fyri ikki at fleiri príshækkanir skulu koma. Tekniska deild metir at arbeiðini við at bíleggja stál skulu setast í verk beinanvegin. Á FÆ22 eru settar av 4.000.000,- til hettar arbeiði.

**Vinnu- og havnanevndin 04. april 2022:**
Einmælt samtykt at fara víðari við innkomna tilboðnum og at seta bílegging av stálið í verk. Tekniska deild arbeiðir víðari við at gera endaliga avtalu við veitarar. Málið verður beint í fíggjarnevndina og møguliga býráðið.

**Fíggjarnevndin 21. april 2022:**
Einmalt samtykt tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini. –Málið verður beint í Býráð.

**Býráðið 05. maj 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini.

**25/22**
**22/00137-1 Tvøroyrar skúli -Leasingsáttmálið Sp.F Aktiv farteldur til lærarar**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.03.2022 | 20/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 05.04.2022 | 42/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.04.2022 | 38/22 |
| 4 Býráðið | 05.05.2022 | 25/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 5. Mars. 2022**
Forkv. í mentanarnevndini hevur á fundi við skúlastjóran umrøtt leasing avtaluna um teldur til lærarar, sum gongur út tann 31. Juli 2022.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ongin játtan er beinleiðis avsett á FÆ2022, at endurnýggja leasingavtaluna. Játtan er avsett til íløgur skúli 3.624tkr.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndin og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 08. marts 2022:**
Málið verður flutt til næsta fund

**Mentanarnevndin 05. april 2022:**
Einmælt samtykt at endurnýggja leasingavtaluna, og at hetta verður fíggja við eykajáttan til FÆ2022 §410.

**Fíggjarnevndin 21. april 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Mentanarnevndini. –Málið verður beint í Býráðið

**Býráðið 05. maj 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Mentanarnevndini. Játtanin verður fíggja av innistandandi við at veita eykajáttan til §410.

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |

Til kunningar

**11/22**
**22/00096-1 Skattatøl 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 2/22 |
| 2 Býráðið | 22.02.2022 | 5/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 3/22 |
| 4 Býráðið | 30.03.2022 | 6/22 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.04.2022 | 5/22 |
| 6 Býráðið | 05.05.2022 | 11/22 |
| 7 Fíggjarnevndin | | |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2022**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2021/2022

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022/23**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 22. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**12/22**

**21/00588-9 Planlegging og Innkeyp av útgerð til spæliplass í Fróðba**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 15.03.2022 | 11/22 |
| 2 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 07.04.2022 | 18/22 |
| 3 Býráðið | 05.05.2022 | 12/22 |

**Málslýsing:**
Vísandi til avgerð í býráðnum tann 22.02.2022, mál nr. 10/22, er avgerð tikin um at gera spælipláss í Froðba á matr. nr. 26b.



Tekniska deild hevur arbeitt víðari við loysn til at gera spælipláss og hevur í hesum sambandi fingið tilboð uppá fýra ymiskar loysnir.

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið latið trivnaðar- og umhvørvis nevndini, at taka støð um uppskot og tilboð. Fígging er á FÆ22, og eru settar av kr. 795.000,- til spæliplássið í Froðba.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 15. marts 2022:**
Dømur vóru gjøgnumgingin. Nevndin ynskir betri tekningar og hevur hesar viðmerkingar.
Ynski er at spæliplássi kann gerast so at ymisku økini vera bundin saman av gøtum.
Ynski er at reiggustativ hevur minst tvær vanligar reiggur og eitt reiður.
Ynski er at nýta størra torni, tó at hettar kann vera til størri børn eisini.
Ynski er at trampolinir vera í økinum, sum er størri enn tær í miðbýnum.
Ynski er at ein gynga/ danda verður í økinum.
Ynski er at fáa upplýst prís um undirlag eru undir øllum spæliplássinum.

**Tekniski leiðarin 5. marts 2022:**
Tekniska deild hevur fingið dagførdan prís, í mun til ynsktu broytingarnar.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 07. april 2022:**
Nevndin ynskir at taka av tilboðnum og ynski er at lutirnar vera samalaðar meira í vestara partinum av stykkinum.

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

## 13/22
## 22/00175-5 Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 827a í Froðba - Marlena Dahl Joensen og Søren Skov Jensen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 2/22 |
| 2 Býráðið | 05.05.2022 | 13/22 |

**Málslýsing:**
Umsókn er komin um byggiloyvi til "Easy dome" sethús í Støðlunum.

**Tilmæli:**
Byggiloyvi verður latið tá ið íbindingargjaldið er goldið.

**Tekniska nevnd 04. april 2022:**
Nevndin er kunnað.

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**14/22**
**22/00183-2 FM radio støð -FM1/Voxpop**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 05.04.2022 | 43/22 |
| 2 Býráðið | 05.05.2022 | 14/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 24. Mars 2022**
Umsitingin hevur móttikið fyrisp. um stuðul og loyvið til at uppseta FM sendistøð til FM1 og Voxpop.

Umsøkjarin Ragnar Sjúrðarson, skrivar m.a. í umsókníni at:

> *Vit á FM1 arbeiða áhaldandi við at víðka um okkara sendinet. Í skrivandi løtu, so hava vit sendarar í Havn, Nólsoy, Høganesi, Brúnaskarði og á Sornfelli. Okkara mál í 2022 er at seta 4 nýggir sendarar upp, har ætlain er at ein teirra skal verða á Tvøroyri, so at vit kunnu røkka suðuroynna við okkara útvarpi.*
>
> *Tað er her eg vil spyrja tykkum hjá Tvøroyrar Kommunu, um tit ynskja at gera eitt samstarv við okkum. Tað er kostnaður fyri sendarar, antennur og tilhoyr, sum vit hugsa um.*
>
> *Á VoxPop spæla vit feskan pop tónleik og er hendan rásin mest fyri yngra ættarliðið, men eisini plaga handlar, hárfríðkanarstovur og hýruvognar fyri at nevna nøkur dømi, at hava VoxPop frá. Vit eru frá seinasta fríggjadegi av, byrjaði at hava vertir á ymiskum sendingum á VoxPop. Sendingin hevur prát, tónleik, kappingar og gestir.*
>
> *Kostnaðurin fyri hetta liggur um kr. 50.000, men vit vilja spyrja um tit ynskja at lata 25.000kr so hetta kann gerast veruleiki :)*
>
> *Taka tit av, og velja at hjálpa okkum at seta sendarar upp á Tvøroyri, so bjóða vit tykkum eitt samstarv. Vit skulu afturfyri tykkara fíggjarliga íkast senda kunngerir, lýsingar um átøk o.a sum hendur á Tvøroyri á rásunum komandi árið.*

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** Søkt verður um stuðul á kr. 25.000,-

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 05. apríl 2022:**
Einmælt samtykt at veita kr. 15.000,- í stuðul.

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað –Kristina Roest ynskir upplýsing hvørt rásin hoyrist um alla kommununa. Borgarstjórin er ivasamur hvør tað er rætt at kommunan kann stuðla einari íløgu í eina radistøð. Málið verður tikið upp til nýggja viðgerð.

**15/22**
**22/00197-1 Jarðhiti - kunning um umsóknir í 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 4/22 |
| 2 Býráðið | 05.05.2022 | 15/22 |

**Málslýsing:**
Til kunningar, hava vit higartil í ár latið loyvi til 13 jarðhitaskipanir (15 borihol).

Kommunan veitir eftir umsókn loyvi til at gera og nýta jarðhitaskipanir, og hon skal senda umsóknir til ummælis hjá Umhvørvisstovuni, áðrenn loyvi verður latið. Eitt avgerandi krav er, at frástøðan skal vera í minsta lagi 20 metrar ímillum hvørja jarðhitaboring.

Økið er lógarregulerað í:
https://www.logir.fo/Logtingslog/22-fra-16-03-2012-fra-jardhitaskipanir
https://www.logir.fo/Kunngerd/101-fra-15-10-2012-fra-fyriskipanir-i-sambandi-vid-jardhitaskipan

Á kortal ber til at síggja verandi jarðhitaboringar, við at seta flugubein í "Grøn orka".

**Tilmæli:**
Kunning

**Tekniska nevnd 04. april 2022:**
Nevndin er kunnað.

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**16/22**
**22/00198-1 Nýtt parkeringspláss á Hamri - á matr. 66b**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 3/22 |
| 2 Býráðið | 05.05.2022 | 16/22 |

**Málslýsing:**
Dánial Vang, eigari av sethúsunum á Froðbiarveg 155, hevur søkt um loyvi at gera parkeringspláss á matr. nr. 66b.
Dánial hevur fingið loyvi frá Landsverki, og kommunan hevur eisini givið loyvi.

**Tilmælið:**
Kunning.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:**
Nevndin er kunnað.

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað –Borgarstjórin ynskir viðmerkt at Landsverk hevur givið loyvið uttan at hoyra Tvøroyrar kommunu, sum er byggimyndugleikið á økinum.

**17/22**
**22/00201-2 Ósin í Trongisvági hevur flutt seg norðureftir**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 25/22 |
| 2 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 07.04.2022 | 15/22 |
| 3 Býráðið | 05.05.2022 | 17/22 |

**Málslýsing:**
Av natúrligum áðum hevur ósin í Stórá flutt seg norðureftir, og hevur skapt eina sandgrynnu framanfyri verandi strandalinju. Samstundis er máað burturav áarbakkanum.
Mett verður ikki at reinsiverkið er í vanda, men strondin frammanfyri vil hvørva og gerast áarbakki í staðin.

Fyrr ella seinni vil áin av sær sjálvari bróta ígjøgnum sandgrynnuna, og byrja at byggja eina nýggju sandgrynnu longri úti. Alt lendið í Ósanum er eitt úrslit av at áin so við og við byggir land.

**Tilmælið:**
Vit kunnu vita um Náttúrufriðingarnevndin vil loyva, at vit royna at grava ígjøgnum sandgrynnuna longri suður, sum víst á viðhefta korti.

**Tekniska nevnd 04. april 2022:**
Einmælt samtykt at tekniska deild fer at tosað við friðingarmyndugleikan um at grava og gera ábøtur við ósamunnan og flyta henda suðureftir.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 07. april 2022:**
Nevndin er kunnað.

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**18/22**
**22/00202-1 Umsókn um gerð av parkeringspláss á matr. nr. 541a og 541b á Tvøroyri - Varðin Pelagic**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 5/22 |
| 2 Býráðið | 05.05.2022 | 18/22 |

**Málslýsing:**
Vit hava fingið umsókn frá Varðanum Pelagic um loyvi til at víðka verandi P-pláss á matr. nr. 541a og 541b (Gistingarhúsið undir Heygnum).

**Tilmæli:**
Umsóknartilfarið er í lagi, og tað verður mett at vera ein avgreiðsluspuringur, og at loyvi verður latið.

**Tekniska nevnd 04. april 2022:**
Nevndin er kunnað.

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

19/22

**22/00204-1 Starvsfólk til bókhaldið**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.04.2022 | 41/22 |
| 2 Býráðið | 05.05.2022 | 19/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 04.04.2022**
Kommunustjórin og fíggjarleiðarin mæla til, at søkja eftir einum skrivstovufólkið til bókhaldið í inniverandi ári. Hetta grunda á, at deildin eftir 1. august bert er manna við 1. starvsfólkið umfram fíggjarleiðaran. Hetta verður ikki mett vera nógv mikið til at røkja allar uppgávurnar í bókhaldinum og á fíggjardeildini.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** Kann vera neyðugt at avsett eykajáttan til lønir á §114, FÆ2022.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 21. april 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá kommunustjóranum og fíggjarleiðaranum.

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**20/22**
**22/00213-2 Kantinan í ítróttarhøllini -útboð av rakstrinum 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.04.2022 | 43/22 |
| 2 Býráðið | 05.05.2022 | 20/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 19. Apríl 2022**
Mælt verður til at bjóða raksturin av kantinuni í Ítróttarhøllini út, nú verandi loyvishavari hevur sagt upp.

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2022:**
Einmælt samtykt bjóða raksturin av kantinuni í ítróttarhøllini út, samb. tilmælið hjá umsitingini.

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 18:40

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Jens Arni Leo Hammerfoss

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen